LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 20. apríl 2016
J.Nr.: LUM-32- 15/00030-8
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

Frágreiðing

frá

eftirlitsvitjan í

Eirargarði 16 A

tann 12. mars 2015

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

Innihaldsyvirlit

1. Inngangur 3

2. Skipan av eftirlitsvitjanini 4

3. Lýsing av Eirargarði 16 A 5

4. Samrøða við eindarleiðaran, varaeindarleiðaran, samskiparan og starvsfólkaumboð 5
   4.1. Skipan av umlættingini 6
   4.2. Heilivágur og røkt 6
   4.3. Menningarætlanir 7
   4.4. Samskifti við børnini 7
   4.5. Samstarv við foreldur 7
   4.6. Samstarv við skúlan 7
   4.7. Samstarv við fjølbrekatoymið Smæruna 8
   4.8. Starvsfólk 8
   4.9. Valdsnýtsla 8
   4.10. Bíðilisti 8
   4.11. Visitering 8
   4.12. Eftirlit 10
   4.13. Brunaviðurskifti 10
   4.14. Gjald 11

5. Rundtúrur á deildini 11

6. Samrøða við starvsfólk 11

7. Endalig samrøða við leiðsluna 13

8. Samandráttur 14

9. Tilmæli 16

1. Inngangur

Tann 1. oktober 2014 varð heimildin hjá Løgtingsins umboðsmanni víðkað til eisini at fevna um eitt serligt eftirlit við privatum stovnum o.ø., sum hava til uppgávu at taka sær av børnum. Umboðsmaðurin skal m.a. hava eftirlit við, at Føroyar halda ásetingarnar í Barnarættindasáttmálanum hjá Sameindu Tjóðum (ST) um at tryggja rættindi hjá børnum og ungum.

Í hesum sambandi gjørdi umboðsmaðurin av at fara á eftirlitsvitjanir á stovnum fyri børn, sum hava menningartarn og/ella bera fjølbrek. Orsøkin til hetta var, at børnini á hesum stovnum teljast millum tey veikastu í samfelagnum og hava lítlan og ongan møguleika at siga frá sjálvi, um teirra rættindi ikki verða vird.

Umboðsmaðurin gjørdi í fyrsta umfari av at fara á eftirlitsvitjanir í Frítíðartilboðnum við Landavegin í Tórshavn og í fjølbrekatoyminum Smæruni í Tórshavn. Seinni gjørdi umboðsmaðurin av at víðka eftirlitsvitjanirnar til eisini at fevna um Skúlan á Trøðni og umlættingarstovnarnar Eirargarð 16 A í Tórshavn og Reiðrið (nú Mýrusóljan) í Runavík. Á henda hátt var gjørligt at fylgja fleiri av børnunum í fjølbrekatoyminum Smæruni gjøgnum allan gerandisdagin og harvið fáa eina heildarmynd av gerandisdegnum hjá teimum og síggja tey tilboð, sum vórðu bjóðað teimum. Eftirlitsvitjanin í Eirargarði fevndi sostatt bara um tey børn við fjølbreki, sum dagliga vóru í fjølbrekatoyminum Smæruni og til umlætting í Eirargarði av og á.

Heimildirnar fyri slíkum eftirlitsvitjanum eru at finna í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann, sum broytt við løgtingslóg nr. 157 frá 20. desember 2013 (umboðsmanslógini), og eru soljóðandi:

> "...
>
> **§ 4**. Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu), og viðurskifti hjá børnum á privatum stovnum v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum.
>
> ...
>
> **§ 5**. Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingareindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.
>
> **§ 6**.
>
> ...
>
> *Stk. 7*. Umboðsmaðurin kann kanna allar stovnar, myndugleikar og tænastustøð, sum eru fevnd av virkisøkinum hjá umboðsmanninum.

§ 8. Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.

...

3. stk. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

…"

2. Skipan av eftirlitsvitjanini

Á eftirlitsvitjanini í Eirargarði luttóku vegna Løgtingsins umboðsmann Sólja í Ólavsstovu, umboðsmaður, og Elinborg Apol, løgfrøðiligur fulltrúi.

Áðrenn eftirlitsvitjanina varð Almannaverkið kunnað um vitjanina og hevði í hesum sambandi latið umboðsmanninum neyðug skjøl og upplýsingar viðvíkjandi teimum børnum við fjølbreki, sum vóru til umlætting í Eirargarði. Í tilfarinum vóru bara upplýsingar um røkt fyri nøkur av børnunum.

Við skrivi, dagfest 29. september 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, um Almannaverkið hevði ætlanir um at útvega skrivligar upplýsingar um røkt fyri øll børnini, sum vóru til umlætting í Eirargarði.

Við skrivi dagfest, 26. oktober 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at Almannaverkið, síðan eftirlitsvitjanina, hevði útvegað skrivligar upplýsingar um røkt fyri øll børnini, sum vóru til umlætting í Eirargarði.

Eftirlitsvitjanin vardi í 2½ tíma og byrjaði við eini samrøðu við eindarleiðaran fyri Eirargarð 16 A, A, varaeindarleiðaran fyri Eirargarð 16 A, B, samskiparan í Eirargarði 16 A, D og starvsfólkaumboð fyri Eirargarð 16 A, E.

Aftaná fundin varð umboðsmaðurin vístur runt í stovninum.

Í sambandi við eftirlitsvitjanina var leiðslan í Eirargarði kunnað um, at umboðsmaðurin eisini ynskti at tosa við tey starvsfólk í stovninum, sum vóru um børnini við fjølbreki, meðan tey vóru til umlætting har. Umboðsmaðurin hevði samrøðu við trý av starvsfólkunum.

Eftirlitsvitjanin endaði við einari samrøðu við eindarleiðaran, A, og varaeindarleiðaran, B.

Áðrenn eftirlitsfrágreiðingin hjá umboðsmanninum varð endaliga greidd úr hondum, varð hon send Almannamálaráðnum, Almannaverkinum og Eirargarði 16 A til viðmerkingar. Ongar viðmerkingar vóru til frágreiðingina.

Í sambandi við eftirlitsvitjanina hevur umboðsmaðurin millum annað tikið útgangsstøði í niðanfyrinevndu reglum:

Lovbekendtgørelse nr. 100 af 2. mars 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 83 frá 22. mai 2015.

Kunngerð nr. 6 frá 16. januar 1992 um ST-samtykt frá 20. november 1989 um rættindi barnsins – Barnarættindasáttmálin.

Sáttmáli sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

3. Lýsing av Eirargarði 16 A

Eirargarður er bygdur í 1970´unum og varð tikin í nýtslu 1. apríl 1980. Umframt at veita samdøgurðsumlætting til børn, sum bera fjølbrek, er Eirargarður eisini sambýli hjá 21 vaksnum fólki við menningartarni og/ella fjølbreki. Eirargarður er partur av trivnaðareind 7 í Trivnaðardeplinum hjá Almannaverkinum.

Eingin endamálsorðing var fyri umlættingina av børnunum í Eirargarði.

Við skrivi, dagfest 29. september 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, um Almannaverkið hevði ætlanir um at gera eina endamálsorðing fyri umlættingina í Eirargarði av børnunum, sum bera fjølbrek, sum m.a. lýsir, hvat innihald umlættingin skal hava.

Við skrivi, dagfest 26. oktober 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at høvuðsendamálið við umlætting til børnini var at veita foreldrunum umlætting. Tó hevði umlættingin eisini eitt endamál og innihald fyri barnið. Deildin í Eirargarði var júst farin í holt við at framleiða tilfar til ein faldara, sum skuldi lýsa endamálið við arbeiðinum við umlættingini, og bleiv hetta tilfar tøkt um stutta tíð.

4. Samrøða við eindarleiðaran, varaeindarleiðaran, samskiparan og starvsfólkaumboð

Eftirlitsvitjanin byrjaði við einari samrøðu við eindarleiðaran, A, varaeindarleiðaran, B, samskiparan, D, og starvsfólkaumboð, E.

Umboðsmaðurin greiddi frá, at hon m.a. fór at hyggja eftir hølunum, hvørji tilboð børn við fjølbreki høvdu í Eirargarði, um lóggáva manglaði á økinum, um Barnarættindasáttmálin varð hildin o.s.fr. Eisini fór hon at spyrja um ymiskt, sum hon hevði lagt til merkis undir

eftirlitsvitjanunum í hinum støðunum, har børnini vóru, og sum foreldrini høvdu greitt henni frá. Umboðsmaðurin ynskti við eftirlitsvitjanini at vísa á møguligar manglar fyri at bøta um korini hjá børnum, sum bera fjølbrek. Í sambandi við eftirlitsvitjanina høvdu starvsfólkini í Eirargarði møguleika fyri at gera vart við trupulleikar og skipanir, sum, eftir teirra tykki, ikki virkaðu, og á henda hátt fáa gjørt broytingar.

4.1. Skipan av umlættingini

Fýra av børnunum, sum gingu í fjølbrekatoyminum Smæruni, vóru til umlætting í Eirargarði. Vanlig umlætting fevndi um 10 vikuskifti um árið. Tá børnini ikki vóru til umlætting, fingu tey tilboð um stuðul heima við hús.

Nøkur av børnunum vóru í víðkaðari umlætting í upp til 20 dagar um mánaðin. Víðkaða umlættingin bar við sær, at um okkurt barn hevði havt eina ringa nátt við t.d. nógvum krampum, hevði tað møguleika fyri at vera heima frá skúla, í Eirargarði.

Starvsfólkini í Eirargarði høvdu ein smidligan hugburð til umlætting. Um eitt barn t.d. bleiv sjúkt, meðan tað var til umlætting í Eirargarði, fór tað heim at vera. Um foreldrini hinvegin skuldu út til okkurt serligt, so kundu foreldrini venda sær til Eirargarð fyri at hoyra, um barnið kundi vera har, meðan foreldrini vóru úti. Ein skipan var júst byrjað, har tað var møguligt at fáa umlætting í summarfrítíðini.

Orsøkin til, at umlættingin var á einum bústovni fyri vaksin, var, at eingin bústovnur er fyri børn, sum bera fjølbrek. Starvsfólkini hildu, at tørvur er á einum slíkum bústovni. Víst varð eisini á, at tað kundi verða trupult at arbeiða sum døgnstuðul, tí barnið verður sum eins egna, og tá kann tað vera torført at vera yrkisligur.

Við skrivi, dagfest 29. september 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, hvørjar ætlanir Almannaverkið hevur um at greina tørvin á einum bústovni til børn, sum bera fjølbrek.

Við skrivi, dagfest 26. oktober 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at Almannaverkið fylgir við, hvør tørvurin er. Í løtuni verður mett, at tørvur ikki er á at gera nýggjan bústovn fyri børn, sum bera fjølbrek.

4.2. Heilivágur og røkt

Eirargarður hevði skrivligar mannagongdir í sambandi við at geva heilivág, og hesar mannagongdir vórðu eisini fylgdar. Foreldrini høvdu tó ábyrgdina av at skamta heilivágin og koma við honum.

Skrivligar mannagongdir vóru eisini fyri, hvussu starvsfólkini skuldu bera seg at, um starvsfólk gloymdi at geva heilivág, ella heilivágur varð givin til skeivan persón.

Heimasjúkrasystir kom í Eirargarð, um onkur hevði liggisár ella okkurt annað bagdi, sum skuldi røktast. Børnini fingu ikki ergo- ella fysioterapi, meðan tey vóru í Eirargarði.

Eirargarður er væl staðsettur, um okkurt álvarsligt skuldi stungið seg upp, tí stovnurin liggur so nær Landssjúkrahúsinum.

4.3. Menningarætlanir
Ongar menningarætlanir vóru fyri børnini, tí tey vóru til umlætting í Eirargarði í frítíðini. Tá skuldu børnini hugna sær, taka sær av løttum og hava tað stuttligt. Gerandisdagarnir gingu mest við røkt, men í vikuskiftunum plagdu tey at ganga túrar, spæla bingo, hoyra tónleik o.s.fr.

4.4. Samskifti við børnini
Stovnurin hevði ætlan um at taka í nýtslu skipanina Boardmaker til samskifti við børnini. Í hesum sambandi hevði verið skeið fyri starvsfólkunum í 3 dagar.

Við skrivi, dagfest 29. september 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, um ætlanin at nýta Boardmaker til samskifti við børn, sum bera fjølbrek, var sett í verk. Eisini bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, hvørjar ætlanir Almannaverkið hevði, um at starvsfólkini, sum vóru um børnini við fjølbreki, fingu skeið í samskiftisháttinum teknmáli/tekn til talu, soleiðis at tey betur vórðu før fyri at samskifta við børnini.

Við skrivi, dagfest 26. oktober 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at tað í løtuni bara vóru tvey børn, sum nýttu umlættingina í Eirargarði, og at hesi ikki nýttu teknmál/tekn til talu. Eftir tilráðing frá Sernám var Boardmaker nýtt sum samskiftisháttur. Starvsfólkini í Eirargarði høvdu fingið frálæru í Boardmaker árið fyri, og starvsfólkini í fjølbrekatoyminum Smæruni vóru í ferð við at seta hetta í verk. Tá ið tað varð klárt at fara undir, bleiv toymisfundur hildin, har kontaktfólk í Eirargarði fóru at luttaka, umframt náttarvaktartoymið og starvsfólk í fjølbrekatoyminum Smæruni. Um tørvur verður á at nýta teknmál/tekn til talu seinni, verður hetta tikið upp tá.

4.5. Samstarv við foreldur
Starvsfólkini upplýstu, at samskiftið var gott millum starvsfólkini í Eirargarði og foreldrini at børnunum.

4.6. Samstarv við skúlan
Eirargarður hevði ikki so nógv samskifti við Skúlan á Trøðni. Trupulleikar høvdu verið í sambandi við at fáa dagligu mannagongdina í Eirargarði at passa saman við tímatalvuni hjá onkrum av børnunum. Sambært tímatalvuni skuldi barnið vera í skúlanum kl. 8:00 um morgunin, um barnið skuldi í venjingarhylin, men hetta kundi ikki lata seg gera, tí bussurin kundi ikki koma í Eirargarð eftir barninum fyrrenn kl. 8:00. Starvsfólkini í Eirargarði og í Skúlanum á Trøðni vóru heldur ikki altíð samd um, hvat børnini vóru før fyri, t.d. viðvíkjandi tí

at samskifta. Avtalað var júst komin í lag við Skúlan á Trøðni um at halda skipaðar fundir, og teir fóru at byrja í næstum.

4.7. Samstarv við fjølbrekatoymið Smæruna
Arbeitt varð við eini ætlan um at flyta fjølbrekatoymið Smæruna í Eirargarð 14 at vera, soleiðis at Smæran fór at halda til í sama bygningi sum samdøgursumlættingin.

Við skrivi, dagfest 29. september 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, hvussu langt ætlanin, um at flyta fjølbrekatoymið Smæruna í bygningarnar í Eirargarði 14, var komin.

Við skrivi, dagfest 26. oktober 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at Almannaverkið enn ikki hevði fingið ræðisrætt yvir Eirargarði 14. Samráðingar vóru ímillum Almannaverkið og Heilsuverkið um, at Almannaverkið skuldi yvirtaka bygningin Eirargarð 14. Hesar vóru ikki komnar á mál enn, men Landsverk var í ferð við at gera kostnaðarmeting og tíðarætlan. Um samráðingarnar bóru á mál, varð væntandi klárt í juli 2016, men endaliga góðkenningin var ikki komin upp á pláss enn.

4.8. Starvsfólk
Nítjan starvsfólk arbeiddu í Eirargarði, nøkur sum avloysarar. Sjey av starvsfólkunum vóru námsfrøðingar, meðan tólv vóru hjálparfólk. Hóast lýst hevði verið eftir sjúkrarøktarfrøðingum, hevði eingin søkt. Sostatt var einki heilsufakligt starvsfólk á stovninum.

Okkurt barn hevði stuðul við sær, tá tað var til umlætting í Eirargarði. Onnur børn høvdu egna náttarvakt við sær.

Í 2014 var stór útskifting í starvsfólkahópinum. Hetta komst av, at skipanin við sovandi náttarvaktum var tikin av, og fleiri av teimum, sum høvdu arbeitt sum sovandi náttarvaktir, valdu at fara úr starvi.

4.9. Valdsnýtsla
Vegleiðing um mannagongdir, um so var at valdsnýtsla skuldi komið fyri, lá í starvsfólkamappuni. Starvsfólkini upplýstu, at eingin fráboðan var um valdsnýtslu á deildini.

4.10. Bíðilisti
Eitt barn stóð á bíðilista til umlættingarpláss í Eirargarði. Hetta barn hevði umlætting eitt vikuskifti um mánaðin, men foreldrini ynsktu umlætting eitt vikuskifti afturat um mánaðin. Barnið hevði stuðul hini vikuskiftini.

4.11. Visitering
Tá tørvskanning fór fram í sambandi við visitering til umlættingarpláss, varð ikki bara hugt eftir, hvar pláss var, men eisini um tann, sum fekk bjóðað pláss, hóskaði saman við hinum í

bólkinum. Ójavnt var, hvussu nógvan stuðul tey ymisku børnini fingu. Summi av børnunum fingu almennan flutning heim frá frítíðarítrivi, onnur ikki.

Við skrivi, dagfest 29. september 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, um Almannaverkið hevði nakrar leiðreglur í sambandi við útlutan av stuðli til børn við fjølbreki, sum tryggjar, at líkheitsgrundreglan verður hildin.

Við skrivi, dagfest 26. oktober 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at í sambandi við at Almannamálaráðið var farið undir arbeiðið at gera ein tænastupolitikk, hevði Almannaverkið verið partur av arbeiðsbólkinum. Almannaverkið hevði, við støði í verandi skipan, gjørt uppskot til standardir fyri stuðulstænastur, sum skulu tryggja, at líkheitsreglan verður hildin, og at tað verður meira gjøgnumskygt, hvussu tillutað verður. M.a. skulu øll stuðulsmál endurskoðast minst eina ferð um árið. Ætlanin er, at standardirnir fyri stuðulstænastu verða ein partur av tænastulógini.

Í tilfarinum, sum umboðsmaðurin fekk undan eftirlitsvitjanini, var eitt rundskriv um uppgávubýtið millum Almannastovuna og Nærverkið í sambandi við tilvísing og visitatión. Í tilfarinum varð eisini upplýst, at eingin kunngerð er, sum skipar reglur fyri umlætting fyri børn undir 18 ár.

Við skrivi, dagfest 29. september 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, um Almannaverkið hevði ætlanir um at gera eitt nýtt rundskriv um tilvísing og visitatión, nú Almannastovan og Nærverkið vóru løgd saman til Almannaverkið. Eisini bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, um Almannaverkið hevði ætlanir um at fáa til vegar kunngerð, sum skipar reglur fyri umlætting fyri børn.

Við skrivi, dagfest 26. oktober 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at Almannaverkið helt tað vera óheppið, at ongin kunngerð var til stuðul til børn eftir § 32 c í forsorgarlógini. Almannaverkið hevði tó ikki heimild at gera kunngerð ella rundskriv, tí hendan heimildin liggur hjá Almannamálaráðnum.

Við skrivi, dagfest 28. oktober 2015, bað umboðsmaðurin tí Almannamálaráðið um at greiða frá, um Almannamálaráðið hevði ætlanir um at fáa til vegar kunngerð, sum skipar reglur í sambandi við umlætting fyri børn.

Við skrivi, dagfest 23. november 2015, kunnaði Almannamálaráðið umboðsmannin um, at Almannamálaráðið í løtuni arbeiddi við at orða ein tænastupolitikk, sum skal verða grundarlag undir eini tænastulóg á almannaøkinum. Arbeiðið var liður í tilgongdini hjá Almannamálaráðnum at dagføra forsorgarlógina. Endamálið við lógini er at styrkja rættartrygdina hjá fólki, sum bera brek og at betra um m.a. stuðulsskipanina og umlættingartilboð til børn, ið bera brek. Tænastulógin verður ætlandi gjørd í 2016 við virknaði frá 2017.

4.12. Eftirlit
Bæði námsfrøðiligt eftirlit og heilsufakligt eftirlit eru við Eirargarði. Námsfrøðiligt eftirlit hevði verið í Eirargarði í juni 2014, meðan heilsufakligt eftirlit hevði verið í Eirargarði innanfyri seinasta árið.

4.13. Brunaviðurskifti
Upplýst varð, at rýmingar- og tilbúgvingarætlan, um so var, at eldur skuldi komið í, var klár. Ætlanin var at kunna um rýmingar- og tilbúgvingarætlanina á starvsfólkafundi. Eitt eintak av rýmingar- og tilbúgvingarætlanini skuldi eisini setast í starvsfólkamappuna. Umboðsmaðurin bað um at fáa eitt eintak av starvsfólkamappuni.

Við skrivi, dagfest 29. september 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, um starvsfólkini í Eirargarði eru kunnað um rýmingar- og tilbúgvingarætlanina, og um rýmingar- og tilbúgvingarætlanin er at finna í starvsfólkamappuni.

Við skrivi, dagfest 26. oktober 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at Almannaverkið ynskti at rætta upplýsingarnar um, at rýmingar- og tilbúgvingarætlanin var klár, tí rýmingar- og tilbúgvingarætlanin var ikki liðug, men í umbúna. Almannaverkið upplýsti, at arbeitt varð framhaldandi við at fáa ætlanina lidna, so starvsfólkini vórða kunnað um hana, og hon kundi setast í verk.

4.14. Gjald
Fyri at umlættingin ikki skuldi brúka av kontuni, sum búfólkini rindaðu inn á fyri at búgva í Eirargarði, rindaðu foreldrini, eftir avtalu við Eirargarð, fyri útreiðslur í sambandi við umlætting av børnunum. Umlætting er at meta sum eitt stuðulstiltak eftir § 32 c í forsorgarlógini. Henda grein er rættiliga yvirskipað, og eingin kunngerð er, sum heimilar at taka gjald fyri útreiðslur í sambandi við umlætting fyri børn.

Við skrivi, dagfest 29. september 2015, bað umboðsmaðurin tí Almannaverkið um at greiða frá, um heimild var fyri at taka gjald fyri útreiðslur, sum standast av umlætting fyri børn.

Við skrivi, dagfest 26. oktober 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at Almannaverkið ikki tók gjald fyri, at børn eru til umlætting. Almannaverkið rindaði raksturin av umlættingini, tá talan var um børn. Hetta varð gjørt við, at yvirlit yvir teir dagar, børnini vóru til umlætting, varð sent inn. Tó kundi talan vera um, at foreldur rindaðu fyri eitthvørt tiltak, sum børnini fóru til, meðan tey vóru til umlætting, sum t.d. legur. Hetta var altíð í samráð við foreldrini, sum eisini kundu velja tiltakið frá.

5. Rundtúrur á deildini

Bygningurin var í tveimum hæddum, og lyfta var millum hæddirnar. Atkomuviðurskiftini vóru góð. Uttanduraøkið var stórt við sløttum felagsøki aftanfyri bygningin, og har vóru blómukassar, reiggjur, grill o.a. Tráðleyst internet var í bygninginum. Eirargarður hevði tveir bussar, sum báðir høvdu lyftu. Hesir bussar vórðu brúktir til ymiskt í frítíðini og til at flyta børnini til og frá stovninum, tá tey vóru til umlætting.

Deildin, ið varð nýtt til umlætting, var fyrr býtt upp í tvær sjálvstøðugar eindir. Deildin var nú opnað upp, so talan var um eina samanhangandi deild við eini langari gongd, har kømur, baðirúm, starvsfólkarúm, køkur, v.m. vóru til báðar síður. Tvær staðni varð gongin breiðari, og har vóru felagsrúmini. Frá tí eina felagsrúminum var hurð út til eina stóra vestvenda træterrassu. Felagsrúmini vóru tronglig, tí hjálpartólini hjá búfólkunum og børnunum kravdu nógv pláss. 3-4 persónar vóru um hvørt baðirúm.

Børnini høvdu egin kømur, tá tey vóru til umlætting. Sengurnar vóru serliga tilevnaðar teimum, og foreldrini kundu sjálvi prýða kømrini, um tey høvdu hug til tess.

Deildin var bygd til endamálið og sá út til at vera í rímiliga góðum standi. Hon var tó merkt av sliti og hevði tørv á at verða gjørd meira tíðarhóskandi. Serliga baðirúmini kundu verið fleiri og betri.

6. Samrøða við starvsfólk

Í samrøðuni við starvsfólkini luttóku D, samskipari, F, námsfrøðingur, og G, hjálparfólk.

Starvsfólkini vístu á, at børnini áttu at verið fyri seg sjálvi, tá tey vóru til umlætting, t.d. í øðrum endanum á deildini. Øll fýra børnini vóru til umlætting somu vikuskifti, og tá var sera rokaligt á deildini. Tey sjey føstu búfólkini í Eirargarði vórðu órógvað og strongd av hesum. Tó ótu børnini fyri seg í vikuskiftunum.

Við skrivi, dagfest 29. september 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, um Almannaverkið hevði ætlanir um at bøta um kringumstøðurnar á deildini í sambandi við umlætting av børnunum, sum bera fjølbrek.

Við skrivi, dagfest 26. oktober 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at Almannaverkið kannaði, um møguleiki var fyri at gera eitt felagsøki afturat, soleiðis at tað vórðu trý felagsøki og soleiðis, at tey, sum høvdu tørv á meira friði, kundu vera har. Í løtuni vóru børnini í sama parti á deildini, hóast tey vóru saman við øðrum fastbúgvandi. Orsakað av fysisku karmunum í Eirargarði var ikki møguleiki fyri, at børnini kundu vera fyri seg sjálvi á deildini. Í sambandi við ætlanina at nýtímansgera og fáa ræðisrætt yvir Eirargarði, mælti

Almannaverkið til, at umlættingin verður flutt yvir í Eirargarð 14, har børnini kunnu vera fyri seg sjálvi.

Bygningurin var gamal og trongdi til at setast í stand. Arbeiðsumstøðurnar vóru á eini leið, men av tí at felagsrúmini hingu saman við eini langari gongd, var nógvur larmur til tíðir. Hølini vóru slitin. Serliga baðirúmini trongdu til at verða sett í stand, tí tey vóru niðurslitin. Gjóstur var frá vindeygunum í baðirúmunum, og hetta var serliga óheppið, tí brúkararnir vóru veik fólk, sum toldu lítið av. Eisini átti at verðið bøtt um fúgurnar í baðirúmunum. Fleiri baðirúm áttu at verið, soleiðis at í mesta lagi tvey kømur høvdu baðirúm saman. Trupulleiki var við skinnarunum, til lyfturnar, undir loftinum í gongini, tí teir rukku ikki til øll kømrini.

Við skrivi, dagfest 29. september 2015, bað umboðsmaðurin Almannaverkið um at greiða frá, hvørjar ætlanir Almannaverkið hevði um at nútímansgera Eirargarð.

Við skrivi, dagfest 26. oktober 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at Almannaverkið var í samráðingum um at fáa ræðisrætt yvir Eirargarði 14. Ætlanin hjá Almannaverkinum var at brúka báðar bygningarnar til at gera umstøðurnar betri, bæði fyri tey, sum longu brúktu Eirargarð 16, og fyri onnur. Almannaverkið hevði gjørt uppskot til umbygging av Eirargarði 14 og 16. Í uppskotinum varð m.a. mælt til at gera fleiri baðirúm, soleiðis at allir borgarar fingu beinleiðis atgongd til baðirúm frá kamari sínum. Almannaverkið mælti til, at umlætting og eldri borgarar fluttu yvir í Eirargarð 14, soleiðis at færri búfólk vórðu í somu deild. Harumframt var ætlanin at gera eina heildarumvæling av Eirargarði 14 og 16, soleiðis at bygningarnir komu at lúka nútímans krøvum. Almannaverkið upplýsti, at Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið høvdu avgerðarrætt viðvíkjandi bygningunum í Eirargarði.

Starvsfólkini greiddu frá, at arbeiðsumhvørvið var gott. Einki starvsfólk var sjúkrameldað við strongd. Starvsfólkini vóru fyri tað mesta tilkomin fólk og høvdu so at siga onga sjúkrafráveru. Tað vóru altíð fleiri starvsfólk til arbeiðis, og hetta var positivt, tí so var altíð onkur at spyrja. Fýra starvsfólk vóru til arbeiðis, til børnini vóru farin í skúla ella á dagstovn, og náttarvaktin var farin heim. Aftaná hetta vóru trý starvsfólk til arbeiðis.

Starvsfólkini hildu ikki, at tað var tyngjandi at skula geva heilivág, men tey kundu hugsað sær at fingið skeið í handfaring av heilivági.

Við skrivi, dagfest 29. september 2015, bað umboðsmaðurin, vísandi til at einki heilsufakligt starvsfólk var á deildini, Almannaverkið um at greiða frá, um Almannaverkið hevði ætlanir um, at starvsfólkini skulu fara á skeið í handfaring av heilivági.

Við skrivi, dagfest 26. oktober 2015, kunnaði Almannaverkið umboðsmannin um, at Almannaverkið hevði greiðar vegleiðingar og mannagongdir um handfaring av heilivági og fylgdi ásetingunum frá Sundhedsstyrelsen. Landslæknin førdi heilsufakligt eftirlit við

tilboðunum hjá Almannaverkinum og kom við tilráðingum. Almannaverkið fylgdi hesum tilráðingum. Av tí at Almannaverkið hevði greiðar vegleiðingar og mannagongdir í mun til handfaring av heilivági, umframt heilsufakligt eftirlit, metti Almannaverkið, at hetta var nøktandi.

7. Endalig samrøða við leiðsluna

Eftirlitsvitjanin endaði við eini samrøðu við A, eindarleiðara, og B, varaeindarleiðara. Umboðsmaðurin greiddi frá, hvørjar trupulleikar hon ætlaði sær at taka upp í sambandi við eftirlitsvitjanina í Eirargarði:

- Nútímansgera deildina, serliga baðirúmini
- Hølisviðurskiftini
- Líkheitsgrundregluna, at øll børn, sum bera fjølbrek, og avvarðandi teirra fáa somu tilboð
- Skeið til starvsfólkini í handfaring av heilivági

8. Samandráttur

Tann 12. mars 2015 var Løgtingsins umboðsmaður á eftirlitsvitjan í Eirargarði 16 A í Tórshavn. Eirargarður er m.a. karmur um umlætting fyri børn og ung, sum bera fjølbrek. Umlættingin í Eirargarði er partur av trivnaðareind 7 í Trivnaðardeplinum hjá Almannaverkinum. Eftirlitsvitjanin snúði seg um umstøðurnar hjá teimum børnum við fjølbreki, sum dagliga vóru knýtt at fjølbrekatoyminum Smæruni, og sum vóru til umlætting í Eirargarði. Á eftirlitsvitjanini luttóku umboðsmaðurin og eitt starvsfólk hjá umboðsmanninum.

Samanumtikið er umboðsmaðurin væl nøgd við eftirlitsvitjanina, og Almannaverkið hevur víst vilja at loysa teir trupulleikar, sum umboðsmaðurin vísti á.

Í sambandi við eftirlitsvitjanina sóknaðist umboðsmaðurin eftir skrivligum upplýsingum um røkt fyri øll børnini, sum vóru til umlætting í Eirargarði. Almannaverkið kunnaði um, at upplýsingar nú vóru tøkar um røkt fyri øll børnini.

Umboðsmaðurin sóknaðist eisini eftir eini endamálsorðing fyri umlættingina í Eirargarði. Almannaverkið upplýsti, at arbeitt var við at gera ein faldara, sum skal lýsa endamálið.

Umboðsmaðurin spurdi, um ætlanir vóru um at greina tørvin á einum bústovni fyri børn, sum bera fjølbrek. Almannaverkið upplýsti, at fylgt verður við í, hvør tørvurin er. Mett verður, at tørvur ikki er á einum slíkum stovni í løtuni.

Umboðsmaðurin ynskti at vita, um ætlanin at nýta samskiftisháttin Boardmaker var sett í verk, og um starvsfólkini fóru at fáa skeið í samskiftisháttinum teknmál/tekn til talu. Almannaverkið upplýsti, at starvsfólkini høvdu fingið frálæru í Boardmaker, og at tey børn, sum nú vóru til umlætting í Eirargarði, ikki nýttu teknmál/tekn til talu.

Umboðsmaðurin ynskti at vita, hvussu langt var komið við ætlanini at flyta fjølbrekatoymið Smæruna í Eirargarð 14 at vera. Almannaverkið kunnaði um, at Almannaverkið var í samráðingum um at fáa ræðisrætt yvir Eirargarði 14.

Umboðsmaðurin spurdi eftir leiðreglum, sum tryggja, at líkheitsgrundreglan verður hildin, tá stuðul verður givin til børn, sum bera fjølbrek. Almannaverkið kunnaði um, at uppskot eru gjørd til standardir, sum skulu tryggja, at líkheitsgrundreglan verður hildin. Hesir standardir verða ætlandi partur av komandi tænastulóg.

Umboðsmaðurin eftirlýsti eina kunngerð, sum skipar reglur í sambandi við umlætting fyri børn. Almannamálaráðið kunnaði um, at arbeitt verður við at orða ein tænastupolitikk, sum skal verða grundarlag undir eini tænastulóg, sum skal styrkja rættartrygdina hjá fólki, sum bera brek, og betra um m.a. stuðulsskipanina og umlættingartilboð til børn, ið bera brek. Tænastulógin verður ætlandi gjørd í 2016 við virknaði frá 2017.

Umboðsmaðurin ynskti at vita, um starvsfólkini vóru kunnað um rýmingar- og tilbúgvingarætlanina í Eirargarði. Almannaverkið svaraði, at rýmingar- og tilbúgvingarætlan var í umbúna, og at arbeitt varð við at fáa hana lidna.

Umboðsmaðurin spurdi eftir heimild fyri at taka gjøld frá foreldrunum fyri útreiðslur í sambandi við umlætting av børnunum. Almannaverkið upplýsti, at talan bara var um gjøld fyri tiltøk, og at foreldrini kundu velja tiltøkini frá.

Umboðsmaðurin spurdi, um ætlanin er at bøta um kringumstøðurnar í sambandi við umlætting av børnunum. Almannaverkið kunnaði um, at Almannaverkið kannaði, um møguleiki er fyri at gera eitt felagsøki afturat til tey, sum hava tørv á meira friði. Um Almannaverkið fær ræðisrætt yvir øllum Eirargarði er ætlanin, at umlættingin verður flutt yvir í Eirargarð 14, har børnini kunnu vera fyri seg sjálvi.

Umboðsmaðurin ynskti at vita, hvørjar ætlanir Almannaverkið hevði um at nútímansgera Eirargarð. Almannaverkið upplýsti, at um Almannaverkið fær ræðisrætt yvir Eirargarði 14, ynskir Almannaverkið at heildarumvæla allan bygningin, soleiðis at hann lýkur nútímans krøv. Uppskot vóru gjørd til umbygging av bæði Eirargarði 14 og 16. Sambært uppskotunum verður beinleiðis atgongd til baðirúm frá øllum kømrunum.

Vísandi til at einki heilsufakligt starvsfólk var á deildini, ynskti umboðsmaðurin at vita, um Almannaverkið ætlaði at senda starvsfólkini á skeið í handfaring av heilivági. Almannaverkið helt, at deildin hevði greiðar vegleiðingar og mannagongdir í mun til handfaring av heilivági, umframt heilsufakligt eftirlit, og at hetta var nøktandi.

9. Tilmæli

Umboðsmaðurin mælir til, at rýmingar- og tilbúgvingarætlanin fyri Eirargarð verður gjørd liðug so skjótt sum gjørligt, og at starvsfólkini verða kunnað um hana.

Umboðsmaðurin mælir til, at hølisviðurskiftini hjá umlættingini fyri børn við fjølbreki verða betrað og lúka nútímans krøv, soleiðis at kringumstøðurnar hjá bæði børnunum, sum eru til umlætting, og búfólkunum verða betri. Serliga baðirúmini kundu trongt til ábøtur.

Umboðsmaðurin mælir Almannaverkinum til, at avvarðandi at børnum við fjølbreki fáa betri skrivliga kunning um, hvørji rættindi børn við fjølbreki og familjur teirra hava, hvørji krøv kunnu setast til t.d. umlættingarstovnar, og hvørji tilboð teir einstøku stovnarnir hava til børn, sum bera fjølbrek.

Umboðsmaðurin mælir til, at skipað samskifti verður millum umlættingardeildina í Eirargarði 16 A, fjølbrekatoymið Smæruna og Skúlan á Trøðni, soleiðis at samstarvað verður um m.a. stimbran av børnunum, og soleiðis at tryggjað verður, at samskiftishættirnir eru teir somu í frítíðartilboði, skúla, umlættingarstovnum og heima.

Aftaná at hava verið á eftirlitsvitjan í umlættingarstovnunum Eirargarði 16 A í Tórshavn, Mýrusóljuni í Runavík, fjølbrekatoyminum Smæruni og Skúlanum á Trøðni mælir umboðsmaðurin til, at ein heildarætlan verður gjørd fyri hesi børn, sum eru so heilsuliga veik, soleiðis at sleppast kann undan, at tey verða flutt ov nógv runt. Ein slík loysn ber møguliga við sær, at lærarin kemur á staðið, har børnini eru, fyri at undirvísa.

Umboðsmaðurin minnir Almannaverkið á altíð at hava líkheitsgrundregluna í huga, tá stuðul verður givin til tað einstaka barnið.

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður